LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, við Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

DEILIR TIL HONDA CIVIC
1,4 GL árg 88-91 sera biliga til sølu. Motorur v/gearkassa, hurðar, rútar o.s.fr.
Tlf. 581800/441800

OPEL ASTRA
st.car frá 1997 til sølu. Vælhildin og koyrir væl.
Tlf. 225241/455550

FORD MONDEO TIL SØLU
1.8i, aut. árg. 1994, koyrt 83.000 km. Bilurin er í góðum standi, er sýnaður í januar í ár og kammreimin er skift fyri stuttum. Spildurnýggj summardekk á alufelgum eru undir bilinum og næstan nýggj vetrardekk á felgum kunnu fylgja við. Prísuppskot: kr. 46.000,- Bilurin kann siggjast á www.bil.fo
Tlf. 319325 ella 253205

NISSAN KING CAB
4 hjólstrekk v/last, 4 píkadekk á felgum fylgja við. Sýnaður í ár. Árg: 87. Koyrir væl. Prísuppskot: 20,000 kr.
Tlf. 214141

DIESEL BILUR TIL SØLU
VW Golf 1.6 GTD Turbo diesel, árg. 1987, sýnaður 11.03. Nýggj summardekk v/sportfelgum.
Tlf. 264564/333096

BAGASJUBERARI
til takið á Saab ynskist bíliga til keyps. Bilurin er frá 88.
Tlf. 223231

MOTORUR YNSKIST
Motorur til Honda Accord 2.0 mod. CB3 árg. 91, ynskist til keyps.
Tlf. 225504

MAZDA VØRUVOGNUR
v/ last til sølu. árg. 1986, hevur plátur, koyrir væl, men krevur ábøtur. Toppakningurin skal skiftast. Eykalutir, sum kunnu fylgja við: 2 góðar forhurðar, 1 startari, 1 dynamo, 1 viskaramotorur, 2 felgur, 2 stoyt-doyvarar aftan. Selist fyri hægsta boð yvir kr. 3.000,-
Tlf. 266035

DIESEL BILUR
Citroen ZX, 1.9 Diesel, st.car árg. 95, nýsýnaður, í góðum standi. Til sølu fyri 48.000 kr. Biligari bilur kann ganga inn í keypið.
Tlf. 218980/215656

TOYOTA CARINA II
hvítur, 2.0 XLi, árg. 12/91, el sóltak í góðum standi. Til sølu fyri 34.000 kr.
Tlf. 215656

PEUGEOT TIL SØLU
Peugeot 106D árg. 1995 til sølu.
Tlf. 217271

SAAB 900
árg. 84, koyrir væl, selist biliga. 4 píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 313485

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12[00], t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av moguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

YNSKIST
Daihatsu Charade G-100 1.0 ella 1.3 frá 89 ella nýggjari. Helst sýnaður í 2003, í góðum standi.
Ring 508561

OPEL VECTRA 2.0i
árg. 1989, til sølu sum eykalutir, koyrir.
Tlf. 269913

PÍKADEKK Á FELGUM
155/80 R13 lítið slitin, til sølu fyri kr. 800,-
Tlf. 444771

TIL VOLVO MD11C
ynskist ein br.stofpumpa. Um nakar eigur eina slíka, vinarliga ring
Tlf. 441146 ella 258931

ALUFELGUR TIL SØLU
4 stk. alufelgur, 4 hol, av merkinum AEZ stødd 14" við 2 heilársdekkum 165/65 R14 til sølu.
Tlf. 444655

OPEL CORSA 1.4
árg. 95, nýsýnaður, koyrt 109.000 km. Nýggja kamreim til sølu fyri 43.000 kr.
Tlf. 256495

TIL SØLU
4 stk. píkadekk á felgum (5 hol). Stødd: 175/70 R14. Passa til Toyota Carina 2 og Avensis.
Tlf. 256539/447318

TIL SØLU
Mazda 323, árg. 89, biliga til sølu.
Tlf. 448388 ella 214722

TIL SØLU
D.E.C. Car-fi model AR-161 bilstereo við bandavspælara og reyðum display til sølu fyri 1.000,00 kr.
Tlf. 314103

OPEL ASCONA TIL SØLU
Bilurin hevur koyrt 102.000 km. Nýtt útstoyt og bremsur. Heilársdekk á felgum fylgja við. Koyrir væl, men sleppur ikki gjognum sýn. Fínur at brúka til eykalutir. Verður seldur fyri góðan prís.
Tlf. 224958, Rúni

4 FELGUR 13''
og 4 hol, passa m.a. til Ford Ka, til sølu. Ring
Tlf. 373054

DROYMIR TÚ UM EIN NÝGGJAN FAMILJUBIL?
So hevur tú møguleika fyri at ogna tær ein næstan spildurnýggjan Renault Scénic 1.6. Hann er bert 5 mán. gamal og hevur bara koyrt 5.000 km. Hann er svartur við bensinmotori, hevur sentrallás, hita í setrunum, air con., fleguspælara og nógv annað. Bilurin verður seldur til hægstbjóðandi. Um tú hevur hug at royna bilin ella at geva eitt boð, so ring
Tlf. 521617

CITROEN XANTIA 1.9 TURBO DIESEL
árg. 96, km 118.000, 4 heilársdekk á felgum fylgja við, í sera góðum standi.
Tlf. 222878

KAVAKETUR TIL SØLU
185/14" so gott sum onki brúktar, biliga til sølu.
Tlf. 213058

TIL SØLU
Mitsubishi Pajero 2.5 TD árg. 88, nýsýnaður, í góðum standi, 20.000,- kr.
Tlf. 267584

PÍKADEKK TIL LASTBIL
6 píkadekk til lastbil Good Year stødd 285/70 R19,5 til sølu fyri 8.500,-
Tlf. 213577

TOYOTA COROLLA XLi
árg. 91, sýnaður í juni 2003, í góðum standi, til sølu fyri 11.000 kr.
Tlf. 310208/260535

NISSAN KING CAB
4 x 4 v/ last, árg. 11/88, 100.000 km, sýnaður okt. 03, til sølu.
Tlf. 213577

PÍKADEKK TIL SØLU
4 píkadekk á felgum 195/65 R15 til sølu.
Tlf. 224479

NÝSÝNAÐUR
Toyota Corolla 1.3 frá 94, koyrt 117.000 km. Gott Pioneer anlegg við, til sølu fyri 38.000 kr.
Tlf. 229375

TIL SØLU
Toyota HiAce 2,4 diesel 4WD/ 1991 til sølu.
Tlf. 447794 el. 254272

DATSUN 280 ZX
2+2 Targa, beigelittur, hevur koyrt 93.000 km, er frá 82 og í sera góðum standi. Bilurin er frá Sveitz, er 100% orginalur. Nærri fæst at vita á
tlf. 0045 98451620 ella 0045 51298478 e. kl. 17

SKODA OCTAVIA
Ambiente 1.6i svartur, árg. 30-05-02 km 5600, sentrallás, klimaanlegg og fartpilot, til sølu fyri 150.000 kr. ella hægstbjóðandi. Nývirðið á bilinum er 195.000 kr. Ring á
tlf. 361514 ella 561514

VAUXHALL CAVALIER
LI 1998CC 5 hurðar, frá 1992, enskt skrásettur til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 522522/322522

TOYOTA CAMRY
St. car árg. 87 til sølu fyri 2.000,-
Tlf. 215477

GOOD YEAR DEKK
við píkum, stødd 185/75 R16 biliga til sølu.
Tlf. 441293 eftir kl. 18

PÍKADEKK
Fýra góð píkadekk á felgum, brúkt ein vetur, 185/65/15 radial. Nýprísur 5.100 kr. selist fyri 3.000 kr.
Tlf. 229235

BMW 320i
árg. 87 til sølu.
Tlf. 313692

VW GOLF DIESEL
árg. 86 til sølu sum eykalutir, góðan motor.
Tlf. 267584

MAZDA 323
1.8i, árg. 96, í góðum standi.
Tlf. 267584

VEGNA FLYTING
er ein Skoda Fabia árg. 2001, koyrt 31.000 km bíliga til sølu.
Tlf. 217368

CITROEN BX 1.6i
árg. okt. 92, seinast sýnaður 12.02. til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 222177

PÍKADEKK
á felgum 2 ára gomul. Stødd 175/65/R14 hava 4 hol. Kunna brúkast til VW Polo Classic
Tlf. 214142

MAZDA 323
1.3 árg. 1987 til sølu. Sýnaður 3/2003. Prísuppskot 7000,- kr.
Tel. 228030

VW JETTA
árg. 88, gráur, til sølu fyri 8.000,- kr. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 211838

VW PASSAT
árg. 1986 til sølu sum eykalutir, kann koyra.
Tlf. 441434/775556

PÍKADEKK
Fýra góð píkadekk á felgum, 4 hol, 185/65/14, 2.000 kr.
Tlf. 371659

PÍKADEKK
4 góð píkadekk 175 x 70 x 14 1500 kr.
Tlf. 371659

PÍKADEKK
2 píkadekk á felgum 175/65 14" + tvær felgur. Passa til Nissan Almera til sølu.
Tlf. 421057/264574

CITROEN SAXO
til sølu. Bilurin er diesel, árgang 2000 Nýsýnaður sær gott út.
214842

TIL SØLU
Mazda 626, árg. 86, koyrir væl, bert koyrt 100.000 km, manglar ábøtur, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 422139 ella 222342

Amboð

STIGI TIL SØLU
Mrk. Wibe, úr aluminium, 8 m. langur, sera lættur, 1 ára gamal, til sølu. Nýprísur kr. 2.600,- Gev eitt boð.
Tlf. 213058

ELEKTRISK HÆFTE- OG
sømpistol, 20 skud pr. minut, magasin til 120 hæfter, søm og klemmer. 3.000 ekstra klemmer og søm medfølger kr. 650,-
Tlf. 250338

Arbeiði

LANDSLIÐSVENJARI
Søkt verður eftir venjara til kvinnulandsliðið í hondbólti. Umsókn skal sendast til HSF, Box 1023, 110 Tórshavn í seinasta lagi 08.12.03.
HSF-Skrivstovan

REINGERINGSHJÁLP
søkist 2-3 tímar um vikuna.
Tlf. 310648 eftir kl. 18

UM TIT VILJA
hava nakað málað innandura nú til jóla, kunnu tit ringja á
tlf. 508817

VASKING Í HAVN
Nærløgd og álítandi 34 ára gomul kvinna bjóðar seg fram at vaska fyri fyritøkur ella privat allar vikudagar, eisini aftan á vanliga arbeiðstíð. Eg eri altíð at hitta á tlf. 270027 ella 320515.
Tlf. 270027/320515

REINGERINGSHJÁLP
søkist 2 tímar hósdag seinnapart.
Tlf. 316865/225665/217782

HJÁLP TIL JÓLA?
Tørvar tær hjálp til jóla t.d. til reingerð/høvuðsreingerð ella at mála okkurt rúm? Eg eri álítandi, arbeiðssom tilkomin kvinna, ið kann veita jólahjálp eftir arbeiðstíð og vikuskiftinum. Helst í vestur-/miðbýnum.
Tlf. 316219

VASKIARBEIÐI
Tilkomin kvinna søkist til reingerð 2 tímar um vikuna eftir tørvi.
Tlf. 313520 aftaná kl. 18

Barnaansing

ER TAÐ NAKAR
ið hevur brúk fyri barnagentu? Eg eri ein 18 ára gomul genta, ið gjarna vil ansa barni/børnum tínum.
Tlf. 520895

Barnaútgerð

MYRKABLÁUR BRIO
barnavognur, nýttur til eitt barn, selist saman við fluguneti, tasku og regnslag. Systkinasetur kann fylgja við.
Tlf. 424554

MYRKABLÁUR BRIO
barnavognur og lift til sølu fyri 2.500 kr. Nýprísur 5.000 kr.
Tlf. 310956

BILBARNASTÓLUR
0-18 kg. til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 316451

BARNABILSTÓLAR
2 Chicco barnabilstólar bíliga til sølu.
Tlf. 316798/214334

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Ein svartur barnavognur av merkinum TRILLE til sølu. Hevur lufthjól, lift, tasku og flugunet. Sær út sum nýggjur.
Tlf: 372465/222427

TRILLE BARNAVOGNUR
við madrassu, dýnu + kodda, lift, puslitasku, regnslag og kurv undir. Nýprísur 5.500 nú 3.500
Tlf. 310215

RIMASONG
5 mðr. gomul rimasong við seingjarrond, himmal og seingjartoy til sølu fyri 1500,-
Tlf. 310215

FERÐASONG
Ferðasong til sølu fyri 275,-
Tlf. 310215

TIL SØLU
Bilbarnastólur MaxiCosi mino 0-10 kg. Siege multi 0-18 kg. Britax super 10-25 kg. Borðstolur at hanga, ein barnareiggja úr plast.
Tlf. 314797/514797

BARNABILSTÓLUR
Britax bilstólur upp til 13 kg. til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 456454/226383 eftir kl. 17

TIL SØLU
Brúktur barnavognur bláur, 400 kr.
Tlf. 421810/261585

Bátaútgerð

AWI 27 TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst er ein Awi 27 við allari útgerð og fiskiloyvi til sølu. Er í sera góðum standi.
Tlf. 451028/220372

UM HÓSKANDI
boð fæst, verður útróðrarbáturin M/B Brimnes seldur. Báturin hevur einki fiskiloyvi.
Tlf. 441560/224226

5-MANNAFAR
(glastrevja) til sølu við leysamotori. Báturin er í Vági.
Tlf. 217335

Bingo

SUÐUROYINGAR
Gott jóladunubingo verður í Framtíðini mánakvøldið 24. nov. kl. 19.00. Góðar føroyskar dunnur til bingo. Á lurtaseðli føroysk gás og høvuðsvinningur gávukort á kr. 1000,00. Enskar karamellur millum nøkur spøl.
Kirkjukórið Ljómur

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 17. november kl. 19. Nógvir góðir vinningar
Astma og Allergifelagið

BINGO VERÐUR
í Pálsstovu sunnudagin 16. nov. kl. 16. Gávukort til øll spølini, 75, 150, 500 kr. Á lutaseðli 12 x 100 kr. og 3 x før. krov. Bingola, eykaspæl.
Kiwanisfelagið Rósan

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini 18. nov. kl. 19.30. Full pláta 300 kr. Á lutaseðli m.a. fleiri 1/2 krov, kalkun, enskar karamellur, 500 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl verður.
K.F.U.M.-skótarnir

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði, leygardagin 15. november kl. 16.00. Á lutaseðli 2 ísl. krov.
Eldrafelagið Borgin

VÁGS PENSIONISTAFELAG
hevur gott bingo í Framtíðini onskvøldið 26. nov. kl. 19. Á lutaseðli ræst kjøt, skerpikjøt, før. kjøt, karamellur o.m.a.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
hevur bingo í Losjuni mikukvøldið 19. nov. kl. 18.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum á Strondum, leygardagin 15.11. kl. 16.00. Burturlutað verða gávukort, matur o.a.
9a í Stranda skúla

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba tórskvøldið 20. nov. kl. 19.
Nevndin

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba leygarkvøldið 15. nov. kl. 20, minna eykaspælið endar.
Nevndin

GOTT JÓLABINGO
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 25. november kl. 19. 6. og 12. spæl gávukort á 500 kr. Nógvir góðir vinningar so sum dunnur, karamellur og nógv annað gott. 12 plátur fyri 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli balja full av mati. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

LADEMANNS
Leksikon frá 1-22 til sølu fyri 300,- kr.
Tlf. 311267

Burturm. /funnið

FARTELEFON FUNNIN
Ein Ericsson T68 funnin í Birnugøtu í Havn. Telefonin kann heintast á
tlf. 319735

KONTOINN-TASKA
Svart, kontoinn-taska, við skúlabókum í, horvin á torginum í sms hósdagin 6/11. Vinarliga um tú hevur sæð ella veit um hana so ring.
506040 ella319637

Býli

ÍBÚÐ Í SVØRÍKI TIL SØLU
Nýumvæld øll sum hon er, og einans 25 min. frá KBH, 70 fermetrar.
Tlf. 254402

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ynskist til leigu í Tórshavn.
Tlf. 210426

HÚS YNSKIST TIL LEIGU
í Tórshavnar umráðnum av friðaligum, ikki roykjandi fólkum. Max 6.000 kr.
Tlf. 224910/317865

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru 2 systrar, sum ynskja eina íbúð í Tórshavnar kommunu, vit hvørki roykja ella drekka og eru friðaligar.
Tlf. 361560/221381

GOYMSLUHØLIÐ TIL 12. MANN?
12. Maður leitar eftir goymsluhølum í Tórshavn til ognir felagsins. Má hava egna inngongd og kunna læsast. Um tú veit okkurt høli/stað, so vilja vit fegin frætta frá tær sum skjótast. Ring 213 212 og hoyr nærri.
12. Maður, tlf. 213212

ÍBÚÐ Í TÓRSHAVN TIL LEIGU
Ein spildurnýggj íbúð uppá 68 fermetrar við sera góðum útsýni, hevur 2 sovikomur, til leigu frá 1. januar 2004 til friðarlig fólk, ið hvørki drekka ella roykja. Prísur: 6.000,- umframt ljós og hita. 2 mðr. depositum! Skriva til: Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1713/5

VERILSI TIL LEIGU
fyri lesandi uttanbýggja fólk.
Tlf. 373964/513964

KAMAR Í MIÐBÝNUM
(16 fermetrar) til leigu eitt atgongd til kok og bað, iroknað el + hiti 2.600,- kr. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1713

ÍBÚÐ Í KBH
Møblerað 2-rúmsíbúð við altan, centralt á vesturbrúgv til leigu vikuskifti ella longri. Nærri fæst at vita á
tlf. 261560

HJÁLP
Einlig mamma við 2 smáum børnum ynskir at leiga eini minni hús ella eina íbúð. Má hava 3 sovirúm, helst í Havn. Max 4.000,- pr. mðr. v/ ljós og hita.
Tlf. 229041

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
Mamma við einum barni ynskir hús ella íbúð til leigu í Vestmanna skjótast gjørligt.
Tlf. 584392

HÚS TIL LEIGU
Hús í Vági til leigu.
Tlf. 217335

1-VERILSISÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð á Oyrasundskollegiinum til leigu í styttri tíðarskeið frá 1. des. Íbúðin er møblerað. Skal tú niður at ferðast, ella manglar tak yvir hovdið, so ring ella meyla á:
32887032 ella nitram1999@hotmail.com

ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
Einlig kvinna ynskir lítla íbúð í Havn.
Ring 509289

LÍTIL ÍBÚÐ
til 2 lesandi ynskist skjótast í Eysturoynni. Fara væl um.
Tlf. 264304, Jóhannes/256116, Helga

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
Vit eru eitt par við 2 bornum, sum ynskja íbúð ella hús við minst 3 kømurum í Tórshavn, Hoyvík, Argjum ella í Kollafirði skjótast gjørligt.
Tlf. 503079

HÚS ELLA ÍBÚÐ
søkist til leigu í Klaksvík skjótast moguligt. Vinarliga ring
457396

NEYÐARRÓP
Eini hjún søkja íbúð í Havn skjótast gjørligt. Roykja og drekka ikki. Gjalda til tíðina, kunnu gjalda 1 mðr. depositum. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1704/1

Dansur

FORELDRABÓLKURIN »KOM OG DANSA FYRI UNG«
skipar fyri dansiskeið 13-18 ár í Losjuni í Havn. Dansilærarar eru frá »Komið og Dansið« úr Íslandi. Undirvíst verður í Rock'n Roll, Salsa, Linedance, o.a. 22.-23. nov.
Ringið á 511707, 210780 og 215570

KLAKSVÍKAR DANSIFELAG
Hugnakvøld verður í Skálanum 15. nov. kl. 20. Tekning hjá einum av nevndarlimunum áðrenn 14. nov.
Nevndin

ALL THAT RAIN Í HVALBA
Leygarkvøldið 27. desember, spælir All That Rain í Roynhøllini í Hvalba.
Royn

JÓLADANSUR
Aftur í ár verður skipað fyri dansi í samband við jóladogurðarnar. Í høllini á Hálsi í Havn spæla »Moonshot« góðan dansitónleik leygarkvøldið 13. desember. Kostnaður 100,- kr. Forsøla er í Kunningarstovuni í Havn. 20 ára aldursmark.
Stuðulsfelagið Knørrur

Dýr

HYGG HER!
Vit eru 5 marsvínaungar, sum gjarna vilja hava eitt heim. Um tú vilt hava ein av okkum, ring so á
tlf. 452081 ella 224481

AKVARIUM TIL SØLU
4 mðr. gamalt akvarium 25 l. við pumpu, hitalikam, lampu og fiskum til sølu fyri kr. 800,- nýprísur kr. 1.300,-
Ring 319913

HAMSTRARABÚR
til sølu við nógvum tilhoyri. Kostnaður 500 kr.
Ring 319110/256250

MARSVÍNABÚR?
Hevur nakar eitt innandura marsvínabúr at lata okkum? Vinarliga ringið
321702 um kvøldið

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur »bamsutur« hvølpur undan lítlari tík verður latin. Hann er brúnur og talan er um eitt lítið hundaslag.
Tlf. 321702, um kvøldið

INNIBÚR
til kaninir og marsvín til sølu fyri 450 kr. Nýprísur 695 kr, er uml. 1/2 ára gamalt, men bert brúkt í uml. 3 mðr. stødd l. 80 x h. 40 x b. 48 cm.
Tlf. 229807, Klaksvík

KETTA, HÁLV ANGORA
burturblivin á Varðagtu. Hon er hvít, svørt og reyð. Búkurin tó bara hvítur. Tann,ið veit nakað um hana at siga, vinarliga ring
Tlf. 315681

UNDULÁTUR TIL SØLU
Undulátur til sølu fyri kr. 500. Búr við tilhoyri fylgir við.
Ringið 443216

KANINUNGAR TIL SØLU
Kaninungar til sølu fyri 50 kr. stk. til djóravinir.
Tlf. 441761

ER TAÐ NAKAR
í Saltangará ið saknar eina kritahvíta kanin?
Tlf. 447001

KANINUNGAR
fáast við at ringja til
tlf. 313738/213736

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur brúnur hundahvølpur – tík – 10 vikur, fæst við at avheinta hana. Bert til djóravin.
Tlf. 254036

BÚR TIL DVØRGAHAMSTRARA
Búr til dvørgahamstrara ynskist. Eigur nakar eitt búr til dvørghamstrarar at selja mær. Kriatúr kunnu møguliga fylgja við í keypinum.
Tel. 320133 (eftir kl 17.00)

HEY DJÓRAVINIR
Tveir fittir svartir 9 vikur gamlir kettlingar verða latnir djóravini.
Tlf. 321203

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur ljósabrúnur og hvítur handahvølpur (7 vikur) verður latin djóravini.
Ringið 321702 um kvøldið

HYGG HER!
Hvør vil hjálpa mammu mínari við at geva mær eitt gott heim. Eg eri ein border collie tík, eg eri svørt og hvít og sera fitt.
Tlf. 424277

HEY HEY
Vit eru 2 fittir kaninungar, sum fylla 6 vikur 1/2 nov. Vit eru sera mjúkir og gleða okkum til tú ringir eftir okkum
á 262515 eftir kl.16.00, Rannvá

MARSVÍN
Brúnt/hvitt, 2 mðr. gamalt, 80 kr.
Tlf. 266575, Norðasta Horn

KETTLINGAR
Triggir fittir kettlingar fáast við at heinta teir. Duga at eta, leppa og pissa í sand. Ert tú góð við kettu, so ring. Bert til djóravin.
Tlf. 456894/250242

Fundir

AÐALFUNDUR HJÁ STØKK
Árligi aðalfundurin hjá Fimleikafelagnum Støkk verður í Støkkhøllini mikukvøldið 26. november kl. 20.00. Skrá: Formansfrágreiðing, Roknskapur fyri 2002-2003, Broytingar av lógum felagsins, Innkomin mál, Val av nevndar- og tiltakslimum og Ymiskt. Allir limir biðjast møta.
Fimleikafelagið Støkk

AÐALFUNDUR
Árligi aðalfundurin hjá Dansifelagnum Fragdini verður í bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 30. november kl. 21.00. Skrá sambært lógum felagsins. Allir limir eiga at møta.
Dansifelagið Fragdin

Húsarhaldstól

ATLAS FRYSTISKÁP
til sølu fyri 1.000,- hædd 105 cm. br. 55 cm. dj. 60 cm.
Tlf. 322885

ZANUSSI KØLI/FRYSTISKÁP
til sølu fyri 3.500 kr. 9 mðr. gamalt.
Tlf. 508660/458033

Innbúgv

REOLSYSTEM
4 sekt. reolsystem 1000. kr. Sofaborð við kaklum 800 kr. Alt er myrkt.
Tlf. 503448

SKRIVARABORÐ
Skrivaraborð v/ hill til telduskerm og skáp til teldu. Lútviðgjørd fura – stødd 60 x 120 cm. – 2 ára gamalt. Nýprísur uml. 2.400,- til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 315474

REOLVEGGUR TIL SØLU
sær gott út, mát 135 cm. br. til sølu fyri 400,-
Tlf. 449906

ANTIK SKÁP TIL SØLU
Hædd 178 cm, breidd 96 cm, djúpd 44 cm.
Tlf. 321321

SONG TIL SØLU
Træsong úr furu, 93 x 208 cm. við so gott sum nýggjari madrassu, mrk. Comfort, tjúgd 18 cm, og botni til sølu. Nýprísur uml. kr. 3.500,- Gev eitt boð.
Tlf. 213058

SPÍSIBORÐ TIL SØLU
ovalt oljuviðgjørt furuborð við útskornum beinum 160 cm + 2 plátur á 40 cm - ólitið - til sølu fyri kr. 1.500,- (nýprísur 4.000)
Tlf. 444630

KLÆDNASKÁP TIL SØLU
Klædnaskáp, TM Line Profil, hvítt, 1. floks, H:230 B:238 D:60, 4 skjótihurðar, harav 2 jalousi og 2 við spegl, 8 hillar, 2 tráðkurvar og 6 skuffur. Yvirskáp við hill báðumegin og 4 jalousi skjótihurðum. Sera væl viðfari. Til sølu fyri 4.800 kr. Kann siggjast á www.vesenberg.fo/skap.htm
Tlf. 322432

KØKSBORÐ
v/ eykaplátu 158 x 88 selist fyri 300,- kr. Træsong við góðari madrassu 95 x 200 selist fyri 800 kr.
Tlf. 311267

YNSKIST
Ein telefonbonkur v/ skuffum. Ein koyggjusong. Skrivstovustólur á hjólum.
Tlf. 314797/514797

TIL SØLU
Sofasett 1+1+3 (brúkt) 500,-
Tlf. 421810/261585

SOFA YNSKIST
Hevur nakar eina sofu, sum kann sláast út til sovisofu at selja mær fyri umleið 500 kr. Alt hevur áhuga.
tlf. 265862 ella 211962

BORÐ TIL FØROYAR
Er tað nakar, ið kann taka eitt borð (140 x 80) fyri meg til Føroyar fyri 200 kr.
Tlf. 322169/215306, Beinta

KOMMODA
Lítil fitt kommoda í gomlum stíli, útskorið avsýrað eikitræ, stødd: h 60 x b 70 x d 42 cm til sølu fyri 400 kr.
Ur, antikt, at heingja upp, úr avsýraðum útskornum træi, við penduli, til sølu fyri 400 kr.
Kondisúkkla, eldri stílur, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 447990

TIL SØLU
Teak skriviborð v/ skuffum til sølu, mát: 180 x 100 x 90. Runt ljósabrúnt sofaborð ø (90 cm) biliga til sølu.
Tlf. 503249

TIL SØLU
Ein laminat look reol – hvít – til sølu fyri 1.000,-
Tlf. 503249

Leikur

LEGOHÚS
Er nakar sum eigur lego-duplohús, og vil selja tað? Vinarliga ring
tlf. 449996

TIL SØLU
Fjarstýrdur bilur Nikko. Lítið brúktur – 100 kr.
Tlf. 722020

BARBIE LEIKUR
Barbie leikur til sølu fyri 500 kr.
Ring 503329

LEIKUR TIL SØLU
Alt samlað fyri 500 kr. Ring og hoyr nærri, Anna Elisabeth.
Tlf. 375291/513452

Lutaseðlar

FRÁ SØLURÁSINI 2003
Leygardagin 8. nov.
gulur nr. 217,
gulur nr. 68,
gulur nr. 124,
gulur nr. 355,
gulur nr. 50,
gulur nr. 176,
gulur nr. 229,
grønur nr. 201,
grønur nr. 210,
gulur nr. 328,
gulur nr. 51,
gulur nr. 319,
grønur nr. 116,
gulur nr. 74,
gulur nr. 39,
grønur nr. 131,
gulur nr. 443,
gulur nr. 29.
Sunnudagin 9. nov.
brúnur nr. 330,
blár nr. 844,
blár nr. 1119,
brúnur nr. 731,
blár nr. 586,
blár nr. 455,
brúnur nr. 23,
blár nr. 950,
blár nr. 920,
brúnur nr. 635,
brúnur nr. 857,
brúnur 402,
blár 1572,
blár 942,
brúnur nr. 126,
brúnur nr. 778,
blár nr. 1223,
brúnur nr. 47,
blár nr. 1442.
Høvuðsvinningur blár nr. 1189 og grønur nr. 62.
Vinarliga send seðilin til Anfinn Gærdum, 490 Strendur.
Sølurásin 2003

VINNARIN
í neytamykjukappingini, ið var 8. nov., hjá ÓZf var seðil nr. 261. Vit takka fyri stuðulin.
02f í Hoydølum.

HESI NR. ERU DRIGIN
á lutaseðli hjá KFUK í Havn 6. nov. 2003.
1) 198 2) 4575 3) 4786 4) 870
5) 1430, 6) 5172 7) 3576 8) 9619
9) 4074 10) 7690 11) 8033
12) 1634 13) 8673.
KFUK takkar hjartaliga fyri stuðulin.
KFUK

Matur

TIL SØLU
Neytafjórðingar og røst krov til sølu.
Tlf. 212920/328020

HARUR TIL SØLU
Etiklárar harur til sølu, 50 kr. stk.
Vinarliga ring 214283

TIL SØLU
Gæs til jóla kunnu bíleggjast nú.
Tlf. 422053/222934

Pløgg

FØROYSKT SKJÚRT
Hevur nakar eitt før. skjúrt til sølu, stødd 40, longd 115 cm. Vinarliga ring
443145

JUDODRAKT
til sølu fyri 250 kr. st. 10-12 ár.
Tlf. 315321/215326

Samband

SAMBAND YNSKIST
Eg eri 60 ár og sakni eina kvinnu at húgna um og húgna okkum saman. Eg búgvi í Havn. Full tagnarskylda. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1711

Sjavs

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 18. nov. kl. 19.00.
Kafé Blákross

SJAVSKAPPING
verður á Strondum sunnudagin 16. nov. kl. 16.
Strálan

SJAVSKAPPING
verður leygardagin kl. 16.00. Tilmelding ikki neyðug.
NSÍ

Súklur

INVALID SÚKKLA
Trý ára gomul invalid súkkla/knallert til sølu (Trilet). Er í góðum standi.
Tlf. 456766/228266

DREINGJASÚKKLA
Ein dreingjasúkkla við 21 gearum, ynskist til 10-12 ára gamlan drong.
Tlf. 314797/514797

GENTUSÚKKLA
Winther gentusúkkla passar til 6-7 ár, í góðum standi, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 371659

Teldur

NINTENDO OG SPØL TIL PLAYSTATION I TIL SØLU
Nintendu til sølu, 3 joystik, 2 spøl, Golden eye 007, Harvest body kostnaður tils. kr. 950. Tvey playstation I spøl til sølu, Digemon og Jadecocoon, kostnaður kr. 200. Eitt telduspæl til sølu, Diablo1, kr. 100.
Tlf 310640

TELDUSPÆL TIL SØLU
Delta Force Black Hawk Down. Kr. 199,-
Tlf. 510441

FARTELDA
til sølu, 475 MHZ, 32 MB Ram, 4.3 GB, 4 mb Ati Rage grafikkort, modem og ymisk software fylgir við.
Tlf. 422077

TIL SØLU
Litprintari Hp Deskjet 690 300 kr. Smartcard reader/writer 300 kr.
Tlf. 722020

TIL SØLU
Ymisk telduspøl til sølu fyri 200-250 kr. stk.
Tlf. 315255

TIL SØLU
Eitt Playstation I v/ 2 joystikkum. Eitt »Sega master